# Kantinufólk

**Søkt verður eftir einum starvsfólki til nýggju kantinu okkara á Kongabrúnni, ið verður tikin í brúk um hálvan mai.**

**Starvið**
Tú kemur at arbeiða undir góðum arbeiðsumstøðum og í góðum umhvørvi, har tað til tíðir kann verða nógv press á.

Arbeiðstíðin er frá kl. 08:00 til 14:00. Tú kemur at arbeiða saman við Jensu Niclassen.

**Førleikakrøv**
Vit vænta at tú:
• Hevur hollan kunnleika til matgerð
• Ert kvik/ur
• Setir reingerð í hásæti
• Hevur góð samstarvsevni

Ynskiligt er, at tú kanst byrja skjótast tilber.

Løn sambært avtalu.

**Umsókn**
Umsókn, saman við møguligum prógvum, ella viðmælum, skulu verða starvsfólkadeildini í hendi í seinasta lagi mánadagin, tann 10. mai 2004.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at ringja á tlf. 345600 og spyrja eftir Jensu Niclassen ella starvsfólkadeildini.

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Postboks 329, 110 Tórshavn
Tel 345600, Fax 345601
tf@trygging.fo, www.trygging.fo

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
- so ert tú tryggari

*Tryggingarfelagið Føroyar P/F hevur høvuðsskrivstovu á Kongabrúnni í Havn, og 5 deildir kring landið. Í felagnum starvast 126 fólk.*



FAROE LAW

bjóðar heimligar og altjóða loysnir

Tosið við:
Eyðfinn Jacobsen, advokat
ella
Kára á Rógvi , adv.fulltrúa
um tygara tørv

Tróndargøta 19
P.O.Box 1218
FO-110 Tórshavn
tel 359900 - fax 359901
mobil 219902 - 222857
faroe-law@faroe-law.fo
http://www.faroe-law.fo





Minst til haldaragjaldið...!

Sosialurin
Arjgjavegur 26
tel 34 18 00 · fax 34 18 01
e-mail: post@sosialurin.fo


# Klaksvíkar Sjómansskúli

## – ein virkin skúli

**Í august 2004 byrja hesi skeið á Klaksvíkar Sjómansskúla.**

**Sjóvinnuflokkur**
Við hesum skeiði fæst atgongd til framhaldandi lestur til skipara, um tygum eisini hava ta neyðugu siglingartíðina. Nærri upplýsingar hesum viðvíkjandi fáast við at venda sær til skúlan.

Møguleiki verður eisini at taka dugnaskaparskeið í sigling, ið gevur rætt til at føra skip upp til 100 tons út á 30 fjóðringar úr landi.

Í lærutíðini verða skeið tikin innan trygd og fyrstuhjálp.

Skeiðið varar 20 vikur. Tað eru ongar upptøkutreytir til at sleppa inn í sjóvinnuflokkin. Fyri tey, sum seinni ætla víðari, er tað ein stórur fyrimunur at hava gingið í sjóvinnuflokkinum áðrenn, tí her verður grundarlagið til fleiri týðandi lærugreinar lagt. Tvey pláss eru eftir til sjóvinnuflokkin.

**Skipskokkaskeið**
Útbúgvingin gevur øktan førleika at virka sum skipskokkur á føroyskum fiskiskipi.

Kokkaútbúgvingin leggur m.a. dent á, at næmingar læra føðslulæru og reinføri, at proviantera, matgera, baka og borðreiða.

Í lærutíðini verða skeið tikin innan trygd og fyrstuhjálp.

Skeiðið varar í 20 vikur. Skeiðið, ið byrjar í august 2004, er fullteknað, men nýtt skeið byrjar aftur í januar 2005. Har eru nøkur pláss eftir.

**Skiparar**
Nýtt skeið til skiparar byrjar í august 2004. Til hetta skeiðið eru bert nøkur heilt fá pláss eftir.

Útbúgvingin til skipara varar í 1 1/2 ár. Upptøkutreytir til skiparar er treytað at víðkaðu fráfaringarroynd fólkaskúlans í lærugreinunum føroyskt, danskt, enskt, rokning/støddfrøði, alis/evnafrøði við prógvtali í minsta lagi 6 ella javnmett hægri prógv. Ella hevur gingið á sjóvinnuskúla og staðið dugnaskaparskeið í sigling.

**Umsóknarblað**
Umsóknarbløð fáast við at ringja á tel. 456128. Síðsta freist at tekna seg er 20. mai 2004.

# Sethús í Vestmanna til sølu

Eini eldri sethús á Bakkanum í Vestmanna, matr.nr. 81, verða hervið lýst til sølu, um hóskandi boð fæst.

Húsini eru umleið 41 $m^2$ í trimum hæddum, 2 innrættaðar hæddir og kjallari, grundøkið er 233 $m^2$.

Í ovastu hæddini eru 2 kømur, og eitt stórt rúm sum kann nýtast til stovu, ella kømur.

Í miðhæddini er køkur/stova, 1 kamar, wc/bað og gongd.

Húsini eru bygd umleið 1920, og eru umvæld innan og partvíst uttan, og eru sum nýggj innan, m.a. er nýggjur køkur, nýggj gólv, nýggj elinnlegging, nýggj oljufýring og radiatorskipan, og eisini eru húsini plátaði av nýggjum innan, og isoleraði.

Eisini eru øll vindeygu skift (minus kjallari) tey síðstu 10 árini, og takið er gott og partvíst nýtt.

Húsini eru sera hugnalig, og liggja í sera hugnaligum, veðurgóðum og barnavinarligum umhvørvið.

**Áhugað kunnu ringja á tlf. 424792 eftir kl. 17.00**

Føroya Heimavirkisfelag

# Eykaaðalfundur

Boðað verður til eykaaðalfund í hølum felagsins **í J. Paturssonargøtu 24, Tórshavn, sunnudagin 9. mai 2004 kl. 15.00.**

Fundarskrá: Navnabroyting

Uppskot til navnabroyting eru vælkomin til fundin. Nevndin tilskilar sær rætt til endaliga avgerð.

Um fundurin ikki er viðtøkuførur, verður eykaaðalfundur 1/2 tíma seinni.

**Nevndin**


Spurnarkapping á amnesty.fo



Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin i




**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3768
**Navn:** Sp/f Kioskin á Keiuni.
**Adressa**: c/o Jógvan Líggjas Gregersen, 470 Eiði

**Kommuna:** Eiðis Kommuna
**Stovningardato:** 26.04.2004
**Viðtøkudato:** 26.04.2004
**Kapitalur:** Kr. 80.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
**Stovnarar:** Jógvan Líggjas Gregersen, 470 Eiði og Anna Kristiansen, 470 Eiði.
**Stjórn:** Jógvan Líggjas Gregersen, 470 Eiði.
**Tekningarreglur:** Felagið verður bundið við undirskrift av stjóranum.
**Grannskoðari:** Sp/f Grannskoðarastovan á Skála, 480 Skáli.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12.
**Fyrsta roknskaparár:** 26.04.2004 - 31.12.2004
**Endamál:** Endamál felagsins er at eiga og reka handil og annað virksemi í hesum sambandi.

*Skráseting Føroya tann 27. apríl 2004*
*Kristin Balle*

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3769
Navn: Sp/f Bavin

**Hjánøvn**: Sp/f Turid Olsen (Sp/f Bavin) og Sp/f Høgni Olsen (Sp/f Bavin).
**Adressa:** 240 Skopun

**Kommuna:** Skopunar Kommuna
**Stovningardato:** 12.04.2004
**Viðtøkudato:** 12.04.2004
**Kapitalur:** Kr. 80.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kr. 80.000,00 í øðrum virðum til kurs 100.
**Stovnarar:** Petur Høgni Sofus Olsen, 240 Skopun og Turid Kristina Olsen, 240 Skopun.
**Stjórn:** Petur Høgni Sofus Olsen, 240 Skopun og Turid Kristina Olsen, 240 Skopun.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av stjórunum hvør sær ella í felag.
**Grannskoðari:** Sp/f Revisión v/ Kaj Joensen, Stoffalág 4, 100 Tórshavn.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12.
Fyrsta roknskaparár: 12.04.2004 - 31.12.2004
**Endamál:** Endamál felagsins er at reka handil, timburarbeiði- og/tænastur og annað starv í hesum sambandi.

*Skráseting Føroya tann 27. apríl 2004*
*Kristin Balle*


# Góðir brúktir bilar

**Nissan Almera 2.0 Diesel GX** reyður, árg 1996, 4 hurðar, km 90.000, fyrr 72.000,- **nú 69.000,-**

**Opel Corsa 1.2** bláur, árg. 2002, 3 hurðar, km. 35.000 **v/mvg 85.000,-**

**Nissan Primera 1.6 Player** svartur, árg 1995, 4 hurðar, km 139.000, fyrr 67.000,- **59.000,-**

**Opel Corsa Combo Van D** bláur, árg. 2002, 4 hurðar, km. 16.000 **v/mvg 112.000,-**

**Peugeot 206 GTi Special Edition** svartur, árg. 2002, 3 hurðar, km. 40.000 **145.000,-**

**Saab 9-3 TiD 2.2** svartur, árg. 2001, 5 hurðar, km. 35.000 **195.000,-**

**Peugeot 406 2.0** gráur, árg 1999, 4 hurðar, km. 63.000, fyrr 130.000,- **nú 109.000,-**

**Honda Accord 2.0** gráur, árg 1999, 4 hurðar, km. 96.000, fyrr 155.000,- **nú 129.000,-**

**Peugeot Boxer 2.8 HDi 330 MH Van** hvítur, árg 2002, 4 hurðar **v/mvg 160.000,-**

**Seat Cordoba 1.9 D Station Car** gráur, árg 2000, 5 hurðar. km. 38.000, fyrr 109.000,- **nú 99.000,-**

**Opel Astra 1.6 16V** gráur, árg 2000, 4 hurðar, km. 52.000, fyrr 112.000,- **nú 99.000,-**

**BMW 3 Serie** grønur, árg 1987, 4 hurðar, km. 120.000 **33.000,-**

**Opel Vectra 1.7 DT** reyður, árg. 1996, 4 hurðar, km. 195.000 **69.000,-**

**Toyota Corolla 1.6** vínreyður, árg 1989, km. 152.000 **18.000,-**

**Opel Vectra 2.0 DT Station Car** svartur, árg 1997, 5 hurðar, km. 182.000, *sýn 24/03/04* **95.000,-**

**Citroen Xantia 2.0 Hdi SC** grønur, árg 2000, km. 110.000, *sýnaður: 19/03/04*, fyrr 148.000,- **nú 119.000,-**

**Opel Corsa 1.2** grønur, árg. 2002, 5 hurðar, km. 31.000 **v/mvg 99.000,-**

**Hyundai H100 Vøruvogn. Diesel** grønur, árg 1996, 4 hurðar, km 123.000 **59.000,-**

**Hyundai Accent 1.5 AirCon** gráur, árg 2000, 5 hurðar, km 92.000 **89.000,-**

Sosialurin 341800

Gevið gætur: Bilarnir á listanum kunnu verða seldir
Fyrispurningar kunnu vera settir á telefon 34 54 00,
eisini ber til at senda teldupost til: nissan@nissan.fo
Bilarnir finnast eisini á: www.nissan.fo

P/F Meinhardt Arge
v/ Oyggjarvegin • Postsmoga 3171 • 110 Tórshavn • Tel. 31 61 61



Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo


# Leiðari fyri mentanardeildina

Klaksvíkar Býráð hevur gjørt av at seta á stovn mentanardeild til at taka sær av tí vaksandi talinum av málum innan skúla- og mentanarøkið.

**Mentanardeildin**, sum er deild í býráðsumsitingini, hevur sum høvuðsuppgávu at vera fyrisiting hjá mentanarnevnd býráðsins, ið m.a. fyrisitur menta- og skúlamál sambært kommunustýrisskipan býráðsins.

Mentanardeildin hevur m.a. um hendur:
- at fyrireika mál til viðgerðar í mentanarnevnd býráðsins
- at avgreiða daglig umsitingarmál og mál, sum eru samtykt av nevnd/um og býráði
- at umsita tann partin av føroysku skúlalóggávuni, ið sambært lóg um fólkaskúla, frítíðarundirvísing og øðrum skúlalógum eru lagdar út til kommununa,
- at hava umsitingarligt eftirlit við stovnum og deildum innan skúla- og mentanarøkið, sum kommunan varðar av,
- at arbeiða fyri at samskipa nevndu stovnar til ein enn meira miðvísan og samskipaðan leiklut í lokalsamfelagnum,
- at finna fram og fyrireika møgulig nýggj tiltøk á skúla- og mentanarøkinum til frama fyri trivnað og framburð í lokalsamfelagnum,
- at fyriskipa ávís hátíðarhald og
- at fyriskipa vinabýasamstarvinum og møguligum øðrum líknandi tiltøkum í samljóði við stevnuna hjá býráði, nevnd og leiðslu
- at vera við til at orða tey mentanarpolitisku stevnumiðini hjá Klaksvíkar Kommunu

Deildin verður í fyrsta lagi mannað við bert hesum eina starvsfólkinum, sum tí kemur at hava um hendur allar uppgávur hjá deildini. Tann, ið settur verður, krevur tí bæði at duga at arbeiða yvirskipað og við dagligum avgreiðslum hvørt um annað.

**Arbeiðsuppgávur leiðarans verða m.a.:**
- at hava dagligu ábyrgdina av mentanardeildini og at fremja uppgávur hennara
- at vera skrivari hjá mentanarnevndini
- saman við leiðsluni og hinum deildarleiðarunum í býráðsumsitingini at leggja framtíðarætlanir fyri deildina og býráðsumsitingina sum heild

**Menningarmøguleikar:** Vit bjóða eitt spennandi umhvørvi, har deildarleiðarin fær høvi at ávirka møguligar broytingar, ið kunnu ávirka arbeiðsinnihald og umstøður.

**Arbeiðsviðurskifti:** Má tola skiftandi arbeiðstíðir og til tíðir eitt stórt arbeiðstrýst.

**Fyrisitingarstøði:** Deildarleiðarin hevur beinleiðis tilvísing til býráðsskrivaran.

**Førleikakrøv:** Viðkomandi útbúgving frá hægri lærustovni, miðallanga útbúgving ella samsvarandi førleikar. Kunnleiki til kommunal viðurskifti og umsiting, og innlit í skúla og mentamál kunnu geva fyrimun.

**Persónligir eginleikar:** Framtakshugaður, leiðareevni, samstarvshugaður, dynamiskur, loyalur, støðugur, tollyntur v.m.

**Lønar- setanartreytir** verða samsvarandi avtalu við avvarðandi felag.

**Nær byrja.** Starvið verður sett skjótast gjørligt.

Fleiri upplýsingar og møguligir spurningar kunnu setast John Færø býráðsskrivara, tlf. 41 00 00.

**Umsóknir og viðkomandi skjøl** verða at senda Klaksvíkar Kommunu, Postboks 2, 700 Klaksvík, og skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin tann 6. mai 2004.

**Klaksvíkar Býráð**


Lesið Sosialin


# Stongt

Vegna skeið er handilin stongdur frá mikudegnum 5. mai til og við mánadegnum 10. mai.

Átrokandi boð kunnu sendast á fax 318101 ella telefon 212676/312676.

**A. H. Jensen**

Til handilin við Landavegin verður søkt eftir fyrikomandi og røskum

# krambafólki

til skiftandi vaktir. Uml. 30 tímar/viku
Ring ella støkk inn á gólvið og spyr eftir Annbritt.

HJÁ GUNLEIVI

Tlf. 59 51 60 ella 31 21 61